# Tað gerst alt tættari í toppstríðnum

**Javnleikurin ímillum Brøndby og FCM hevði við sær, at FCK hevur betri møguleikar at blanda seg í oddastríðið**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

FCK og Todi Jónsson høvdu frí sunnudagin. Í gjárkvøldið vóru teir í Jyllandi og spældi ímóti Silkeborg, sum hevur eitt av bestu liðunum í Danmark í løtuni. Hvussu tað skarst hjá Toda og teimum í tí dystinum vita vit av góðum grundum ikki. Dysturin varð spældur, eftir at blaðið var farið til prentingar, men vit venda aftur til hetta í morgin.

Hesa ferð kunnu vit staðfesta, at tað lagaði seg so væl fyri FCK, sum tað kundi, tá toppdysturin sunnudagin var á skránni í Brøndby. Oddaliðið, FCM, sum er fyri fyrstu ferð í bestu deildini, vitjaði, og dysturin endaði 1–1.

Fleiri enn trettan túsund áskoðarar vóru í Brøndby, og teir sóu eina uppgerð, sum var oddaliðum í donskum fótbólti verdug.

Aftaná iðraðu gestirnir seg um, at teir ikki høvdu vunnið øll trý stigini. Síðstu løtuna høvdu teir fleiri stórar møguleikar, men teir fingu ikki mál. Bæði málini komu í 1. hálvleiki. FCM fekk eftir 17 minuttir hol á eftir hornaspark, og á hálva tímanum javnaði sviin Krister Nordin.

### Neyðars Lyngby

Annan mikudag skulu Jákup Mikkelsen og teir spæla í Lyngby. Kanska teir í Herfølge síggja ein møguleika at fáa tey stigini í ti uppgerðini, sum teir ikki fingu sunnudagin.

Tá superligan eftir vetrarsteðgin varð tikin uppaftur í mars, taldist Lyngby millum oddaliðini. Teir vunnu í fyrsta umfarinum, men síðani hevur gingið av skriðuni. Í sjey teimum seinastu umførunum hevur Lyngby skorað tvey mál, og teir hava fingið fýra stig.

Hesa ferð vóru teir í Viborg, har heimaliðið vann 3–0. Steffen Højer skoraði fyrsta málið beinleiðis upp á fríspark. Hetta var triði dysturin upp í slag, at hann skoraði upp á henda mátan, og nú siga teir, at hann er ein nýggj útgáva av David Beckham!

AB dró í botninum eitt sindur frá Herfølge. Á heimavøllinum í Gladsakse endaði uppgerðin ímóti OB málleys. Johan B. Hansen er framvegis heilt uttanfyri OB hópin.

AaB var á útivølli í Haderslev. HFK Sønderjylland er longu fokið úr bestu deildini. Hesa ferð megnaðu teir 1–1, og tað hevur við sær, at tey sjey síðstu umførini ikki vera serliga hugalig hjá AaB. Teir hava ongan møguleika í toppinum, og teir nýtast ikki at hava ótta fyri at koma í niðurflytingarvanda.



*Mánakvøldið spældu FCK og Silkeborg oddadyst í Superliguni*

# Bjargingin longri burturi hjá Herfølge

**Eftir tepra tapið á heimavølli ímóti AGF eru vónirnar hjá Jákupui Mikkelsen og teimum um at bjarga lívinum í bestu deildini svunnar uppaftur meiri**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað varð mett sum lívsneyðugt hjá Herfølge at vinna heimadystin ímóti AGF. Liðið úr Århus vann 2–1, og harvið minkaðu vónirnar hjá Herfølge um at bjarga sær uppaftur meiri. Eftir dystin staðfestu fleiri av gestunum, at teir nú mettu, at teirra lið, AFG, hevði tryggjað sær framhaldandi rætt til pláss í bestu deildini. Tað eru sjey umfør eftir at spæla, og AGF er átta stig frammanfyri Herfølge.

3.404 áskoðarar vóru í Herfølge, og teir vóru vitni til eitt orduligt mannfólkastríð. Í 62. minutti varð Nocko Jokovic rikin av vøllinum, tí hann hevði fingið tvey gul kort. Níggju minuttir seinni sá Peter Frank hjá Herfølge ostaflísina. Talan var um beinleiðis reytt kort, tí verjuspælarin hevði brúkt neyðbremsuna.

### Aftur og fram

John Faxe Jensen hevði sett seg sjálvan á miðvøllin hjá Herfølge. Har gjørdi hann so mikið stóra nyttu, at onside sendingin hjá TV3 setti hann á liðið hesa ferð. Tá 10 minuttir vóru farnir, legði spælandi venjarin eina langa sending í AGF brotsteigin. Chris Hermansen rann í bóltin og stútaði hann í málið.

Leiðslumálið hevði við sær, at Herfølge kendi fyritreytirnar styrknaðar at bíða eftir mótstøðumonnunum og harvið at dyrgja eftir møguleikunum at skora upp á snarálop. Men tað var bara ein lítil løta, so var aftur javnt. Eftir 17 minuttir smekkaði John Jensen, sum spælir á AGF miðvøllinum. Málið varð skorað úr 30 metrum, og hóast talan var um eina góða roynd, so eigur eitt skot úr so stórari fjarstøðu ikki at fara í málið hjá so góðum málverja sum Jákupi Mikkelsen.

Eftir steðgin trýsti Herfølge, men AGFarnir vóru fleiri ferðir vandamiklir í snarálopsmøguleikum. Tíggju minuttir inn í seinna umfarið var Bo Nielsen einsamallur við Jákupi Mikkelsen, sum bjargaði sera væl við beinparadu. Tá 67 minuttir vóru farnir, var Bo Nielsen aftur einsamallur, og tá megnaði hann at fáa bótin framvið føroyska landsliðsmálverjanum.

Herfølge legði stórt trýst á málið hjá AGF síðstu løtuna, men tað eydnaðist ikki at fáa mál.

Ummæli, sum Jákup Mikkelsen fær fyri dystin, er misjavt. Onkra staðni verður hann sagdur at vera stórspælandi. Men í karakterbókini hjá Ekstra Blaðnum fær hann bara eitt seks tal. Tað man vera málið úr 30 metrum, sum teir hava hildið eigur at draga niður.

Herfølge hevur frí til annan mikudag, tá teir skulu spæla á útivølli í Lyngby.

# Báðir føroyingarnir vórðu skiftir út

**Sogndal tapti í Lillestrøm, og skoðsmálini til føroysku spælararnar vóru ikki góð**

TIPPELIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað tykist vera tungt hjá teimum báðum føroysku spælarunum í Sogndal at fáa høvdið fyri seg í bestu deildini í Noregi. Í triðja umfarinum var Sogndal fyri aðru ferð á útivølli, og fyri aðru ferð taptu teir við trimum málum. Lillestrøm vann 4–1 á heimavølli, og harvið varð tað aftur staðfest, at tað verður eitt stríð hjá Sogndal at halda seg í bestu deildini, og at stigini, sum skulu skavast saman, fara fyrst og fremst at verða vunnin á heimavølli.

Julian Johnsson og Kurt Mørkøre hava báðir fingið ta álitisváttanina frá venjaranum, at teir hava verið ímillum teir fyrstu ellivu. Tað vóru teir eisini hesa ferð. Men sum í undanfarnu dystum, so spældu teir heldur ikki sunnukvøldið alla tíðina. Julian Johnsson kom ikki á vøllin eftir steðgin, og Kurt Mørkøre varð tikin út, tá tað restaðu ellivu minuttir.

Í VG er metingin av føroysku spælarunm ikki góð. Saman við trimum øðrum spælarum fær Julian Johnsson eitt trý tal, og Kurt Mørkøre er einasti av teimum 22 á vøllinum, sum fær eitt tvey tal. Kurt skoraði eina rúgvu av málum í fjør, og hann verður dømdur út frá, hvussu nógv mál hann skorar í ár. Í trimum teimum fyrstu umførunum hevur tað ikki ligið fyri hjá honum at skora.

Sogndal var í 4–3–3 uppstilling. Julian Johnsson var á miðvøllinum í 1. hálvleiki. Eftir steðgin loysti Kristian Ystaas hann av. Kurt Mørkøre var miðframherji. Saman við honum í álopinum vóru Tommy Øren og Alexander Ødegaard.

Sogndal kom á odda í 3. minutti. Alexander Ødegaard skoraði. Lítla løtu seinni javnaði Lillestrøm. Teir løgdu seg framum í 1. hálvleiki, og síðsta korterið skoraðu teir tvey mál afturat.

Mikukvøldið verður aftur eitt umfar á skránni í norsku kappingini. Tá fær Sogndal vitjan av Stabæk.

### Brattbakk í miðdeplinum

Síðsta heyst varð fyrrverandi liðfelagin hjá Toda Jónsson í FCK, Harald Brattbakk, seldur til norska stórfelagið Rosenborg, har hann áður hevði spælt. Í Keypmannahavn hevði Brattbakk ilt við at vísa máltevið, sum hann annars var kendur fyri. At tað framvegis eru mál í honum, var sjón fyri søgn sunnudagin. Rosenborg vann 4–1 á útivølli ímóti Bodø/Glimt, og Harald Brattbakk skoraði bæði til 2–1 og 3–1.

Bryne vann 4–3 á útivølli ímóti Brann í Bergen. Í fjør fekk Bryne einki stig á útivølli, og sambært VG var hetta fyrsti útisigurin hjá teimum í fleiri ár. Venjarin hjá Brann var ikki blíður eftir tapið, sum hann helt vera eina skandalu. Venjarin hjá Brann eitur Þeitur Þordarson, og hann er íslendingur. Fótbóltsáhugaðir føroyingar eiga at komast við hetta navnið. Í síni tíð sum spælari í Akranesi í sjeyti árunum spældi hann ímóti føroyska landsliðliðnum. Hann hevur verið yrkisspælari m. a. í Noregi. Føroyingar minnast hann eisini frá, at hann hevur verið landsliðsvenjari í Estlandi. Bæði tá føroyska landsliðið í 1997 vann vinardystin á útivølli í Tartu 2–1, og tá føroyingar í 1998 á útivølli í Tallinn í EM undankappingini taptu 5–0. Íslendingurin var eisini venjari, tá Estland í somu kappping vann 2–0 á Tórsvølli 4. september í 1999. Nú er Þeitur Þordarson aftur í Noregi, har hann venur Brann Bergen, og hesa ferð var hann altso rættuliga rísin.



## Støðan, danska superligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál- munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCM | 26 | 13- 8 -5 | 45 | 34 | 11 | 47 |
| 2 | Silkeborg | 25 | 12-10-3 | 38 | 27 | 11 | 46 |
| 3 | Brøndby | 26 | 13- 6 -7 | 59 | 34 | 25 | 45 |
| 4 | FCK | 25 | 11-10-4 | 38 | 21 | 17 | 43 |
| 5 | Viborg | 26 | 12- 6 -8 | 44 | 29 | 15 | 42 |
| 6 | Lyngby | 26 | 11- 5 -10 | 35 | 44 | -9 | 38 |
| 7 | OB | 26 | 10- 5 -11 | 39 | 35 | 4 | 35 |
| 8 | AaB | 26 | 8 -10-8 | 39 | 38 | 1 | 34 |
| 9 | AGF | 26 | 9 - 4 -13 | 40 | 51 | -11 | 31 |
| 10 | AB | 26 | 5 -12-9 | 32 | 33 | -1 | 27 |
| 11 | Herfølge | 26 | 5 - 8 -13 | 30 | 49 | -19 | 23 |
| 12 | HFK Sønderj. | 26 | 1 - 6 -19 | 25 | 69 | -44 | 9 |

## Støðan, danska 1. deild

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál- munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Esbjerg | 23 | 14- 7 -2 | 57 | 20 | 37 | 49 |
| 2 | Køge | 23 | 14- 7 -2 | 51 | 23 | 28 | 49 |
| 3 | Frem | 23 | 14- 6 -3 | 55 | 22 | 33 | 48 |
| 4 | Vejle | 23 | 12- 7 -4 | 55 | 28 | 27 | 43 |
| 5 | B93 | 23 | 11- 3 -9 | 42 | 33 | 9 | 36 |
| 6 | Farum | 23 | 10- 5 -8 | 43 | 32 | 11 | 35 |
| 7 | Brønshøj | 23 | 11- 2 -10 | 47 | 47 | 0 | 35 |
| 8 | B 1913 | 23 | 8 - 7 -8 | 30 | 34 | -4 | 31 |
| 9 | AC Horsens | 23 | 7 - 9 -7 | 29 | 32 | -3 | 30 |
| 10 | Hvidovre | 23 | 7 - 8 -8 | 43 | 43 | 0 | 29 |
| 11 | Randers F. | 22 | 7 - 5 -10 | 30 | 41 | -11 | 26 |
| 12 | Skive | 23 | 6 - 7 -10 | 39 | 57 | -18 | 25 |
| 13 | Fremad A | 23 | 4 - 7 -12 | 32 | 50 | -18 | 19 |
| 14 | Ølstykke | 23 | 5 - 4 -14 | 27 | 63 | -36 | 19 |
| 15 | FC Aarhus | 23 | 3 - 8 -12 | 27 | 56 | -29 | 17 |
| 16 | Birkerød | 22 | 2 - 4 -16 | 27 | 53 | -26 | 10 |

## Støðan, norska tippeligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál- munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Viking | 3 | 3 - 0 -0 | 11 | 4 | 7 | 9 |
| 2 | Lillestrøm | 3 | 2 - 1 -0 | 6 | 2 | 4 | 7 |
| 3 | Odd. Grenl. | 3 | 2 - 1 -0 | 2 | 1 | 1 | 7 |
| 4 | Rosenborg | 3 | 2 - 0 -1 | 9 | 6 | 3 | 6 |
| 5 | Stabæk | 3 | 2 - 0 -1 | 5 | 3 | 2 | 6 |
| 6 | Tromsø | 3 | 2 - 0 -1 | 5 | 4 | 1 | 6 |
| 7 | Molde | 3 | 1 - 1 -1 | 6 | 4 | 2 | 4 |
| 8 | Bryne | 3 | 1 - 1 -1 | 4 | 4 | 0 | 4 |
| 9 | Brann | 3 | 1 - 0 -2 | 4 | 6 | -2 | 3 |
| 10 | Sogndal | 3 | 1 - 0 -2 | 2 | 7 | -5 | 3 |
| 11 | Lyn | 3 | 0 - 1 -2 | 3 | 5 | -2 | 1 |
| 12 | Moss | 3 | 0 - 1 -2 | 2 | 5 | -3 | 1 |
| 13 | Strømgodset | 3 | 0 - 1 -2 | 3 | 8 | -5 | 1 |
| 14 | Bodø/Glimt | 3 | 0 - 1 -2 | 3 | 9 | -6 | 1 |

## Støðan, hollendska toto-deildin

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál- munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Den Bosch + | 30 | 22- 4 - 4 | 59 | 20 | 39 | 70 |
| 2 | Excelsoir + | 30 | 17- 6 - 7 | 76 | 59 | 17 | 57 |
| 3 | FC Zwolle | 29 | 14- 9 - 6 | 62 | 37 | 25 | 51 |
| 4 | Volendam + | 30 | 14- 5 -11 | 47 | 41 | 6 | 47 |
| 5 | G.A. Eagles | 28 | 14- 4 -10 | 56 | 54 | 2 | 46 |
| 6 | Cambuur/L. | 29 | 12- 9 - 8 | 46 | 41 | 5 | 45 |
| 7 | Helmond Sp. | 30 | 12- 8 -10 | 64 | 44 | 20 | 44 |
| 8 | Telstar | 30 | 12- 7 -11 | 39 | 46 | -7 | 43 |
| 9 | Eindhoven | 30 | 11- 8 -11 | 53 | 51 | 2 | 41 |
| 10 | Top/Oss | 30 | 13- 2 -15 | 51 | 54 | -3 | 41 |
| 11 | Dordrecht '90 | 30 | 9 - 9 -12 | 54 | 54 | 0 | 36 |
| 12 | Emmen | 30 | 10- 6 -14 | 49 | 57 | -8 | 36 |
| 13 | Heracles A. | 30 | 9 - 9 -12 | 35 | 48 | -13 | 36 |
| 14 | BV Veendam | | 3010 - 5 | - | 15 | 46 | 60 |
| -14 | 35 | | | | | | |
| 15 | MVV | 30 | 10- 4 -16 | 37 | 53 | -16 | 34 |
| 16 | ADO | | | | | | |
| | Den Haag | 30 | 8 - 7 -15 | 45 | 64 | -19 | 31 |
| 17 | Haarlem | 30 | 7 - 9 -14 | 40 | 56 | -16 | 30 |
| 18 | VVV | 30 | 7 - 3 -20 | 34 | 54 | -20 | 24 |

Príslækking - enn einaferð!
-16%
á fastnettelefoni innanlands
Nú kostar tað einans **32 oyru** um minuttin um dagin og **22 oyru** um minuttin um náttina at siga tað um fastnettelefonina innanlands.
upp til -44%
á fastnettelefoni til útlond
FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum
Tilboð beint nú!
ÓKEYPIS stovning av internethaldi
SPAR 400,00 kr.
Beint nú er tað **ókeypis** at stovna eitt internethald hjá Føroya Tele. Tilboðið er galdandi til 1. august 2001.
Føroya Tele • Postboks 27 • 110 Tórshavn • Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • e-mail: ft@ft.fo • www.tele.fo
petur & petur • 320870